Løgtingslóg

um

broyting í løgtingslóg um avgjald á framleiðslu og innflutning
(Hægri avgjøld á tubbak og snús – fylgilógaruppskot til FLU 2026)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 19 frá 12. mars 2002 um avgjald á framleiðslu og innflutning, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 72 frá 30. apríl 2025, verða gjørdar hesar broytingar:

1. Í kapitli 24 í frumskjali 1 í skjali 1 verður punktavgjaldið á vørunumrinum 2402.10.00 í 3. teigi broytt frá "100 stk. 175,00 kr." til: "100 stk. 200,00 kr."

2. Í kapitli 24 í frumskjali 1 í skjali 1 verður punktavgjaldið á vørunumrunum 2402.20.10 til 2402.90.00 í 3. teigi broytt frá "100 stk. 145,00 kr." til: "100 stk. 180,00 kr.

3. Í kapitli 24 í frumskjali 1 í skjali 1 verður punktavgjaldið á vørunumrunum 2403.11.00 til 2403.91.00 í 3. teigi broytt frá "215,00 kr. pr. kg." til: "280,00 kr. pr. kg."

4. Í kapitli 24 í frumskjali 1 í skjali 1 verður punktavgjaldið á vørunumrunum 2403.99.20 til 2403.99.90 í 3. teigi broytt frá "144,00 kr. pr. kg." til: "2.000,00 kr. pr. kg.", tó so, at punktavgjaldið á vørunummarið 2403.99.35 verður ásett til "800,00 kr. pr. kg."

5. Í kapitli 24 í frumskjali 1 í skjali 1 verður punktavgjaldið á vørunumrunum 2404.11.00 til 2404.19.90 í 3. teigi broytt frá "215,00 kr. pr. kg." til: "2.000,00 kr. pr. kg."

6. Í kapitli 24 í frumskjali 1 í skjali 1 verður aftan á vørunummar 2404.12.00 sum nýtt vørunummar sett: "2404.19.10", "0", "2.000 kr. pr. kg.", "Sum hevur í sær tubbakerstatning".

§ 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, og hevur virknað frá 2. desembur 2025.

Samtykt á Løgtingi hin 17. desember 2025 við 16-0-9 atkvøðum.

forkvinna

/

/

skrivari

Borið saman við samtykta løgtingslógaruppskotið og funnið beint.

Á LØGTINGI, 17. desember 2025

stjóri

LM-018/2025